## ... Piotr Krakowski?

– Piotr var venjari hjá mær bæði í ÍF, B36 og eisini í EB/Streymi. Tú fært ikki fittari mann at venja eitt lið. Hann er forstáiligur og stuttligur, og við honum sum venjara fert tú altíð glaður til og frá venjing.



## ... bindiklubban?

– Kvinnurnar á bakkanum hava uppiborið alt rós. Tær eru við í mótgongd eins væl og tá tað gongur væl – alla tíðina! Frá Mølini til Margáir. Og so nýtist teimum heldur ikki alkohol fyri at hoyrast, og tað er stuttligt.

# aldrinum



Egil á Bø

meg, at hann vildi hava meg við til Portugal, so mátti eg skeita bæði til og høgru og vinstru fyri at kanna eftir, um nakað skjult kamera var nakrastaðni, fortelur Egil flennandi.

Nógv hevði verið tosað um eitt ættarliðsskifti á landsliðnum, so Egil gjørdist rættiliga bilsin um boðini. Men hóast boðini komu óvæntað ivaðist Egil ongantíð.

– Og nú havi eg so spælt fimm landsdystir, og tað hevur verið øgiliga spennandi.

### Frá áskoðara til leikara

Fyri hesar landsdystir hevur Egil á Bø bara fingið rós. Landsliðsvenjari og fjølmiðlar eru á einum máli um, at avrik hansara hava verið ógvuliga góð. Jógvan Martin Olsen, landsliðsvenjari, hevur enn tá sagt, at nú iðrar hann seg eitt sindur um, at Egil ikki varð boðsendur til landsliðið eitt sindur fyrr.

– Tað nyttar lítið hjá mær at iðra meg um tað. Eg eri bara fegin um at vera sloppin at royna tað, og um landsliðsvenjarin er nøgdur við mítt avrik, so eri eg eisini nøgdur, sigur Egil á Bø.

### Nógv er broytt í EB/ Streymi

Tað sum endaði við landsdystum byrjaði annars á grúsvøllinum í Streymnesi. Tá æt felagið hjá Egili Streymur, og einki varð tosað um samanlegging.

– Har gjørdu vit leikarar alt sjálvir og vórðu ikki forkelaðir á sama hátt sum nú, men kortini var tað óguvliga stuttligt.

– Síðani kom samanleggingin og tað vísti seg at rigga beinanvegin. Men eisini tá gjørdu vit leikarar ein stóran part av arbeiðinum sjálvir, og tað er á ongan hátt sum í dag, har vit næstan bara skulu møta upp til venjing í undirbuksum, tí alt annað liggur klárt til okkum, hugleiðir Egil um tíðina í Streymi og síðani EB/Streymi.

Hann kann eisini staðfesta, at ikki bara felagið, men eisini vónirnar og krøvini eru broytt munandi.

## Fakta

**Navn:** Egil á Bø
**Aldur:** 2. apríl 1974
**Familja:** giftur Anju á Bø og hevur børnini Eydna og Hans Pauli.
**Feløg:** Streymur, EB/ Streymur, NSÍ, ÍF og B36
**Landsdystir:** 5

– Frá at liggja og berjast niðast í deildini, har fólk vóru ovurfegin bara vit vunnu ein dyst, skulu vit nú helst liggja í toppinum, har viðhaldsfólkini gerast kedd, um vit bara tapa ein dyst, sigur Egil á Bø, sum hevur alt gott at bera fjepparunum hjá EB/Streymi.

– Eg haldi at teir hava eitt sindur meiri hjarta við í mun til í eitt nú B36, har eg eisini havi spælt. Og man stendur saman um felagið, bæði í við- og mótgongd, heldur Egil á Bø.,

### Liðformaður og aldursforseti

Hann er við sínum 34 árum ikki einans liðformaður, men eisini aldursforseti í Formulaliðnum hjá EB/Streymi.

– Einaferð var eg venjari hjá Gert (Hansen, blðm.), og tá vóru menn sum Arnbjørn og Leif so lítlir, at teir vóru ov ungir at sleppa upp í part. Teimum spæli eg so saman við í dag, og tað sigur kanska eitt sindur um aldurin, flennir Egil, sum við landsdystunum hevur upplivað tað mesta, tú kanst uppliva, sum fótbóltsleikari í Føroyum.

Føroyameistaraheitið við B36. Steypavinnari við bæði B36 og EB/Streymi, og skrásettur fyri altjóða A-landsdystir.

– Tað eru nógvir, ið hava rokkið tí sama sum eg og fleiri enn meira. Men eg eri nøgdur við tað, eg havi nátt og eri ógvuliga fegin um tíðina, eg havi brúkt upp á fótbólt saman við so nógvum góðum fólki, sigur Egil á Bø.

Men hóast nøgdur og fegin, so vantar enn prikkurin yvir tað tiltiknað i'ið: Føroyameistari við EB/Streymi.

– Í fótbólti er tað soleiðis, at tú fært ikki lovað nakað. Men tað sær framvegis ógvuliga gott út, og hóast fleiri tosa um gummibein og arga okkum við tí, so høvdu bæði HB og B36 heldur ynskt at verið í okkara støðu, enn har tey eru nú. At vinna FM er stórt, men tað er uppaftur størri í felagnum, har tú ert uppvaksin, sigur Egil á Bø, sum uttan mun til FM heitið í ár kann staðfesta, at 2008 er hendingarríkasta árið í fótbóltslívi hansara.

– Tað haldi eg, at eg má siga. Einaferð vann eg greipuna við B36; tað var stórt, men hetta slær tað. Og so hava vit eisini framvegis møguleikan at vinna FM, minnir Egil á Bø á.